Fiskiveiðieftirlitið

Fiskirannsóknarstovan

# Dregging eftir mistum gørnum

## Royndir gjørdar vestanfyri Skeivabanka og norðureftir.

**25. august - 28. august 2006**

**FRS smárit 05/2006**

# Dregging eftir mistum gørnum

Royndir gjørdar vestanfyri Skeivabanka og norðureftir.

Tíðarskeið: 25/8- 28/8 2006

Ábyrgd: Símun Joensen

Við fyri FRS: Lise H. Ofstad

Skrivað frágreiðing: Lise H. Ofstad (Fiskirannsóknarstovan), Símun Joensen (Fiskiveiði-eftirlitið) og Jákup Müller (Skipari umborð á "Brimli")

**Endamál**
At dreggja eftir mistum gørnum og kanna møguligan huldufiskiskap ("ghost fishing").

**Inngangur**
Seinnu árini hevur kjakið um í hvønn mun gørn, sum verða mist, halda fram at fiska í einum huldufiskiskapi (á enskum ofta nevnt ghost fishing) verið alsamt meir frammi. Ávirkanin av hesum gørnum – um tey fiska, hvussu leingi tey møguliga fiska, og um tað eru nógv mist gørn – er ein afturvendandi spurningur. Kanningar hava víst, at mist gørn fiska! (NEAFC AM 2005/40, NEAFC 2005 05/29). Í Noregi er ein árlig yvirlitskanning innførd, har endamálið er at fáa aftur mist gørn (report: The norwegian retrieval survey for lost gillnets 2005). Hesar yvirlitskanningar hava víst, at nakað av gørnum verða mist í norskum økjum. Úrslitini fyri 2005 vístu, at í gørnum, sum vórðu fingin aftur, var miðalveiðan fyri hvørt svartkalvagarn 5,33 kg og fyri longugørn 0,1 kg. Tá var vektin av beinagrindum og upploystum/rotnum fiski ikki tikin við í útrokningarnar.

<u>Ásetingar um garnafiskiskap</u>
(frá kunngerð nr. 62 frá 17.09.04 um fiskiskap eftir havtasku og svartkalva við gørnum á føroysku landleiðunum)

§ **6**. Fiskifør við loyvi sambært hesi kunngerð skulu, beinanvegin sett er fyrstu ferð á túrinum, boða Fiskiveiðieftirlitnum frá, hvar gørnini standa við upplýsingum um knattstøðu og dýpi á fyrra enda og seinna enda á hvørjum trossa sær. Verður trossi fluttur meira enn sjey fjórðingar á sama túri, skal boðast frá hesum. *Stk. 2.* Tá túrur endar, og gørnini standa úti, skal boðast frá, hvar gørnini standa, og hvar ætlanin er at avreiða.

§ **7.** Tá fiskifør við loyvi sambært hesi kunngerð fara inn at avreiða, og gørnini standa úti, skulu ikki ganga meiri enn 72 tímar, til skipið aftur er á fiskileið og fer at draga. *Stk. 2.* Fiskiveiðieftirlitið kann í serligum førum veita undantak viðvíkjandi tíðarfreistini.

§ **8.** Um fiskifar missir garn, hevur skiparin skyldu at gera sítt besta til at bjarga ella dreggja garnið, og at geva Fiskiveiðieftirlitinum fráboðan um staðfestingina, har garnið er mist. Skiparin hevur skyldu at boða Fiskiveiðieftirlitinum frá, um tað hevur eydnast at bjarga garninum.

**Útgerð og framferðarháttur**

Í samráð millum Fiskiveiðieftirlitið og Fiskirannsóknarstovuna varð avgjørt at gera eina roynd at dreggja eftir gørnum í føroyskum øki og at nýta vaktarskipið Brimil til uppgávuna. Brimil er 63,60 m langur, 12,60 m breiður og 6,90 m djúpur. Skipið hevur nógva ymiska útgerð umborð, millum annað ymisk spøl og koppar. Fyri at fáa mát av møguligum fongi, vórðu ein vekt og longdarmátibretti tikin við umborð. Um gørnini hava fiskað, er umráðandi at skráseta tal av fiski, um hann er livandi, deyður, hvussu upploystur/rotin fiskurin er, hvat slag og hvussu nógvur fiskur er í tilsamans. Harafturat er neyðugt at staðfesta knattstøðu og dýpi.

Dreggið, sum varð nýtt at dreggja eftir gørnum við, var 1,5 m langt við trimum settum av flíggjum. Millum hvørt sett av flíggjum vóru 43 cm og dreggið vigaði 100 kg. Longdin á veirinum var einar 1,5 – 2 ferðir dýpið, tóvað varð á (175 til 490 m dýpi). Ferðin tóvað varð við, var uml. 2-3 fjórðingar/tíma. Tóvtíðin var frá 20 upp til 190 minuttir, frá at dreggið var á botni, til tað aftur var á dekkinum.

Økið vestan fyri Føroyar varð valt, tí har hevur garnafiskiskapur verið seinnu árini, og skip hava boðað frá at tey hava mist gørn í økinum. Ongi skip royndu heldur í økinum, tá royndin varð gjørd, og tí lá væl fyri at dreggja. Fyrst varð tóvað í somu ætt, sum gørnini høvdu staðið, síðan var dreggjað í sama øki, men upp á tvørs av ættini gørnini høvdu staðið (mynd 1). Tá lína var á dregginum, varð hon drigin inn við einum koppi afturi á dekkinum (mynd 2) og tá gørn vóru á dregginum, vórðu tey gilsað upp (mynd 3).

**Úrslit og umrøða**

Í alt varð dreggjað 25 ferðir. Á tveimum leggum vóru mist havtaskugørn fingin (talva 1). Á leggi 13 vórðu 33 lutfalsliga nýggj havtaskugørn fingin, og í hesum gørnum vóru tríggjar stórar havtaskur, sum í alt vigaðu 35 kg. Hesir fiskar vóru rættuliga illa farnir (mynd 4). Harafturat vóru restir av minst trimum havtaskum og ein fesk longa, sum vigaði uml. 4 kg (mynd 5). Annars var fongurin minst 19 djúpvatnskrabbar (*Gerion sp*., mynd 6). Á nøkrum vóru bara kløur ella restir av kroppinum eftir – í alt vóru 2,5 kg av krabba. Veiðan í alt var sostatt 41,5 kg ella uml. 1,25 kg pr. havtaskugarn. Í hinum legginum, har gørn vórðu fingin, vóru 44 "gomul" gørn. Tá hesi gørnini komu á dekkið, vóru tey illa farin, og allir meskarnir vóru slitnir burtur. Hvørki fiskur ella krabbar vóru í. Óvist er, um gørnini vóru so illa farin orsakað av, at tey hava ligið leingi í sjónum, ella um tey kunnu verða skrødd sundur, eftir at tey komu á dreggið. Hettar seinasta kann eisini verða orsøk til, at fiskur sum møguliga stóð í gørnunum, tá tey komu á, er dottin úr undir dregging, men onnur frágreiðing kann eisini vera, at gørnini fara illa, tá tey standa í sjónum og tí als ikki fiska, tá ein tíð er fráliðin. Garnakveylarnir eru vístir á mynd 7. Í leggi 19 og 22 vóru restir av gomlum garnameskum á dregginum, og í leggi 20 var eitt varp og uppstandari til gørnini (mynd 8). Hettar kann benda á, at gørn hava staðið í økinum, men at tað ikki hevur eydnast at fingið tey upp.

Í tíggju av teim 25 leggunum varð lína fingin. Umleið 3/5 av línuni var gomul lína uttan svøvlar, meðan restin var sonevnda svøvlalínan (mynd 9). Eingir húkar vóru eftir á nakrari línu. Ein standari við boyustong varð eisini fingin. Í alt varð mett, at uml. 3000 m av gamlari línu vórðu fingnir og uml. 2000 m av svøvlalínu.

Helst eru mist gørn í føroyskum øki ein trupulleiki. Við atliti at huldufiskiskapi gav leggið við 33 havtaskugørnum eina miðalveiðu upp á 1,25 kg fyri hvørt garnið. Hetta er minni enn tað, sum er fingið í svartkalvagørnum í Noregi (5,76 kg/garn). Ein orsøk til hetta kann vera meskavíddin, tí svartkalvagørn hava smærri meskar (200 mm) enn havtaskugørn (280 mm).

Royndirnar frá norsku yvirlitskanningunum hava víst, at tað er umráðandi at fáa neyvar upplýsingar um nøgdina av mistum reiðskapi og knattstøðuna, har hann er mistur. Eisini er umráðandi, at kanningin verður gjørd í góðum veðri, tí vánirnar at fáa reiðskap aftur eru verri í ringum veðri. Á hesum royndartúrinum var veðrið av tí fagrasta – hvørki vindur ella alda.

Norsku yvirlitskanningarnar hava eisini víst, at nøgdirnar av mistum gørnum økjast við dýpinum, og í øllum norskum garnafiskiskapi er tað í svartkalvafiskiskapinum, at flest gørn verða mist. Til at kanna hetta kundi tað verið sera upplýsandi at dreggja eftir svartkalvagørnum við Føroyar.

**Niðurstøða og tilmæli**

Við støði í hesari fyrstu lítlu royndini, sum varð gjørd at dreggja eftir mistum gørnum, kann staðfestast, at mist havtaskugørn fiska, men ikki hvussu leingi. Tað ber heldur ikki til at gera nakra niðurstøðu um, hvussu stórur trupulleikin við huldufiskiskapi er út frá hesi royndini, men at hann er til, er hinvegin ávíst. Royndin bendir eisini á, at gørn verða mist, uttan at tað verður fráboðað myndugleikunum. Tí er helst sannlíkt ,at fleiri gørn verða mist, enn ein hevur kunnleika um. Harvið kann ikki útilokast, at trupulleikin við mistum gørnum er størri, enn ein fær varhuga av, út frá fráboðanum um mist gørn.

Við støði í hesari royndini er staðfest, at huldufiskiskapur stendst av mistum havtaskugørnum í føroyskum øki. Úrslitini frá royndum, sum eru gjørdar í Noregi, hava givið eina miðalveiðu í hvørjum svartkalvagarni, sum er nakað hægri enn veiðan í teimum havtaskagørnum, sum vórðu fingin í føroysku royndini. Havast skal tó í huga, at talgrundarlagið undir føroysku royndini er sera lítið og tí bert kann nýtast sum ein ábending. Norsku royndirnar vísa samstundis, at við økjandi dýpi verða eisini meir gørn mist. Ásannandi hesa niðurstøðu, og tá staðfest er, at huldufiskiskapur kemur fyri í føroyskum øki, verður mælt til, at meir umfatandi royndir verða gjørdar at lýsa støðuna við mistum gørnum, og hvussu nógv og hvussu longi mistu gørnini fiska. Slíkar royndir eiga, umframt at verða gjørdar á leiðunum, har havtaska verður veidd við gørnum, eisini at verða gjørdar á djúpari leiðum, har svartkalvi verður veiddur við gørnum.

Staðfest er at fyribrigdið huldufiskiskapur eisini er í føroyskum øki. Royndirnar eru tó so lítið umfatandi, at ongin niðurstøða kann gerast á hesum grundarlagi. Hinvegin er sera umráðandi, at hesar kanningar halda fram soleiðis at til ber at lýsa støðuna viðvíkjandi huldufiskiskapi í okkara øki. Mælt verður tí til at skipaðar og meir umfatandi kanningar verða gjørdar til tess at lýsa støðuna.

Talva 1. Dagbók data.

| Legg | Dato | Byrja Tíð | ºN | ºW | Dýpi (m) | Enda Tíð | ºN | ºW | Dýpi (m) | Fongur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 26/08/2006 | 0505 | 61.77 | 8.50 | 315 | 0525 | 61.76 | 8.50 | 350 | Lína |
| 2 | 26/08/2006 | 0535 | 61.76 | 8.48 | 347 | 0610 | 61.75 | 8.47 | 348 | Lína |
| 3 | 26/08/2006 | 0640 | 61.74 | 8.45 | 269 | 0730 | 61.73 | 8.44 | 311 | Lína |
| 4 | 26/08/2006 | | | | | 0815 | 61.71 | 8.41 | 386 | |
| 5 | 26/08/2006 | 0830 | 61.71 | 8.40 | 365 | 0915 | 61.69 | 8.34 | 207 | |
| 6 | 26/08/2006 | 0920 | 61.69 | 8.33 | 201 | 1010 | 61.66 | 8.28 | 404 | Lína |
| 7 | 26/08/2006 | 1015 | 61.66 | 8.29 | 407 | 1115 | 61.63 | 8.25 | 457 | |
| 8 | 26/08/2006 | 1120 | 61.52 | 8.25 | 462 | 1215 | 61.58 | 8.22 | 269 | |
| 9 | 26/08/2006 | 1230 | 61.57 | 8.21 | 265 | 1320 | 61.54 | 8.17 | 258 | Lína |
| 10 | 26/08/2006 | 1350 | 61.53 | 8.16 | 265 | 1500 | 61.53 | 8.24 | 380 | Lína |
| 11 | 26/08/2006 | 1535 | 61.54 | 8.26 | 415 | 1640 | 61.57 | 8.19 | 484 | |
| 12 | 26/08/2006 | 1700 | 61.58 | 8.27 | 448 | 1832 | 61.65 | 8.28 | 438 | |
| 13 | 26/08/2006 | 1940 | 61.65 | 8.28 | 415 | 2110 | 61.70 | 8.35 | 271 | 33 havtaska gørn * |
| 14 | 27/08/2006 | 0000 | 61.69 | 8.36 | 372 | 0115 | 61.73 | 8.46 | 393 | |
| 15 | 27/08/2006 | 0150 | 61.74 | 8.49 | 412 | 0340 | 61.80 | 8.55 | 334 | 44 havtaska gørn |
| 16 | 27/08/2006 | 0540 | 61.81 | 8.56 | 335 | 0650 | 61.84 | 8.61 | 364 | |
| 17 | 27/08/2006 | 0720 | 61.83 | 8.61 | 361 | 0810 | 61.82 | 8.66 | 418 | Lína, standari |
| 18 | 27/08/2006 | 0910 | 61.82 | 8.65 | 410 | 1020 | 61.83 | 8.55 | 237 | |
| 19 | 27/08/2006 | 1040 | 61.82 | 8.54 | 265 | 1200 | 61.79 | 8.62 | 408 | Lína, restir av gørnum |
| 20 | 27/08/2006 | 1215 | 61.79 | 8.61 | 409 | 1320 | 61.80 | 8.52 | 288 | Lína, uppstandari, varp |
| 21 | 27/08/2006 | 1400 | 61.79 | 8.51 | 306 | 1506 | 61.76 | 8.57 | 330 | Lína |
| 22 | 27/08/2006 | 1550 | 61.75 | 8.57 | 459 | 1705 | 61.77 | 8.48 | 228 | Restir av gørnum |
| 23 | 27/08/2006 | 1720 | 61.77 | 8.47 | 252 | 1822 | 61.74 | 8.52 | 438 | |
| 24 | 27/08/2006 | 1840 | 61.74 | 8.51 | 430 | 1910 | 61.75 | 8.46 | 290 | |
| 25 | 27/08/2006 | 2000 | 61.67 | 8.35 | 490 | 2118 | 61.67 | 8.24 | 175 | |

* Fongur: 35 kg havtaska, 4 kg longa og 2.5 kg krabbar.




Mynd 1. Øki vestan fyri Føroyar, har dreggjað varð.



Mynd 2. Lína verður drigin við koppi.



Mynd 3. Gørn verða gilsaði upp.



Mynd 4. Havtaska fingin í gørnum í leggi 13.



Mynd 5. Gørn á dregginum (legg 15).



Mynd 6. Krabbar.



Mynd 7. Nakað av fonginum.



Mynd 8. Varp og standari til gørn.



Mynd 9. Lína (legg 2).